LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

B Barnaverndartænasta

Tórshavn, tann 28. oktober 2016
J.Nr.: LUM-11- 16/00058-13
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

Viðvíkjandi klaguni frá A, dagfest 17. mai 2016

Tann 17. mai 2016 klagaði A til mín um vantandi innlit í barnaverndarmálini hjá henni og børnum hennara.

Í klaguni varð m.a. skrivað:

> " Í fleiri umførum havi eg roynt at fingið innlit, men hevur hetta ikki eydnast til fulnar, t.d. havi eg fingið brot úr sakini, ella fingið skriv ferð eftir ferð. Hetta er ikki nøktandi fyri meg sum mamma, og tá eg spyrji eftir restini, er einasta svar, hvat fyri pappír mangla. Men tá eg ikki kann siga konkret, hvat fyri pappírir mangla, so er eitt sindur trupult. "

Klagarin sendi mær avgerð frá B barnaverndartænastu dagfest 19. apríl 2016. Í avgerðini fráboðar B barnaverndartænasta, at hon sendir klagaranum yvirlit yvir skjøl í teirra barnaverndarmáli, og so var skrivaður listi yvir tey skjøl, sum vóru viðsend. Hetta eru tó ikki skjalayvirlitini í málunum.

Við skrivi, dagfest 12. juli 2016, bað eg B barnaverndartænastu um frágreiðing um viðgerðina av hesum málum umframt skjalayvirlit.

Tann 29. august 2015 fekk eg umbidnu frágreiðing og skjalayvirlit. Í frágreiðingini greiddi B barnaverndartænasta eitt nú soleiðis frá :

> "B barnaverndartænasta hevur í fleiri umførum veitt A innlit í málið hjá Barnaverndartænastuni.
>
> Vísandi til spurning tykkara um A hevur fingið innlit í øll skjøl í málinum, gerst Barnaverndarumsitingin varug við, at A ikki hevur fingið innlit í innanhýsis skjøl hjá BVT, t.d. upprit hjá børnunum og fundir við Barnaverndarnevndina.
>
> Hetta er ein feilur frá okkara síðu, og er B barnaverndartænasta sera hørm um hetta. Hesin feilur er hendur av misgáum, og er avgjørt ikki fyri, at A ikki skal hava innlit í sítt mál.
>
> B barnaverndartænasta hevur 20.04.2016 sent øll skjøl, t.d. frá skúlanum, skjøl frá sálarfrøðingi, bæði D og E, Barnagarðinum F, Sernám, frágreiðingar frá familjuráðgeva í málinum til A, og 12. mai 16 hevur A fingið innliti í uppritið hjá henni.

> A hevur fingið innlit í øll týðandi skjøl í málinum, sum liggja til grund fyri avgerðini um innskrivan á Fam. Dep. "

Tann 7. september 2016 bað eg B barnaverndartænastu senda mær skjalayvirlitini av nýggjum við eyðmerking av teimum skjølum, sum innlit er givið í.

Tann 17. oktober 2016 móttók eg frágreiðing og skjalayvirlitið frá B barnaverndartænastu. Í frágreiðingini verður skrivað :

> " B barnaverndartænasta hevur veitt A innlit í øll viðkomandi skjøl. Viðsent er skjalayvirlit, har vit hava markerað við ljósareyðum, hvat A hevur fingið innlit í. A fekk innlit í øll viðkomandi skjøl 20.04.2016, og uppritið í málinum varð sent A 20.05.2016.
>
> Fleiri skjøl eru í málinum hjá A eftir 20.05.2016, og tey hevur A fingið innlit í, og avrit av.
> Tað sum B BVT ikki hevur sent A í hennara áheitan um innlit er :
>
> - Játtanarskriv, ið hon hevur frammanundan
> - Skjøl, har B BVT hevur heitt á t.d. skúlan, barnagarðin og Sernám um innlit í teirra mál.
>
> A hevur fingið kunning um, nær Barnaverndartænastan hevur heitt á skúlan, barnagarðin og Sernám um frágreiðing um børnini.
>
> Vónandi svarar hetta tykkara fyrispurningi.
>
> A er vælkomin at venda sær til okkara um innlit í málið eftir 20.05.2016.
>
> A hevur fingið innlit í øll skjøl viðvíkjandi henni og børnunum, sum hava týdning í málinum. "

Niðurstøða:

Avgerðin hjá B barnaverndartænastu frá 19. apríl 2016 og eyðmerkingin á skjalayvirlitinum vísa, at partsinnlit er givið í skjøl í málinum, men ikki í øll skjøl. Klagarin hevur ikki fingið skjalayvirlit yvir øll skjølini, ið eru skrásett í málunum, og hevur ikki fingið grundaða noktandi avgerð um tey skjøl, sum tað sambært eyðmerkingini hjá B barnaverndartænastu, ikki eru givin innlit í.

Sambært fyrisitingarlógini § 9, kann hann, sum er partur í einum máli, har fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, krevja at verða gjørdur kunnigur við skjølini í málinum. Rætturin hjá einum parti til skjalainnlit fevnir, við teimum í §§ 12 – 15 í fyrisitingarlógini nevndu undantøkum, um øll skjøl, sum viðvíkja málinum og innføringar í journalir. Fær partur í málinum ikki innlit í øll skjøl ella upplýsingar í málinum, er talan um at sýta innlit, eisini um einki er nevnt um hesi skjøl ella upplýsingar í avgerðini, sum er fráboðað partinum.

Eru tað skjøl ella upplýsingar í málinum, sum myndugleikin metir eru undantikin fyri partsinnliti eftir reglunum í §§ 12-15 í fyrisitingarlógini, skal myndugleikin samsvarandi § 21 í fyrisitingarlógini ítøkiliga grundgeva fyri, hví tað ikki verður givið innlit í ávís skjøl ella upplýsingar. Tað kann í hesum sambandi viðmerkjast, at parturin í málinum altíð hevur krav uppá innlit í skjalayvirlitið í málinum, tó so, at eru upplýsingar skrásettir í skjalayvirlitið, sum

eru undantiknir innliti eftir §§12-15 í fyrisitingarlógini, so kann myndugleikin taka tær upplýsingarnar úr skjalayvirlitinum (ekstrahera).

Í samband við viðgerð av spurninginum um partsinnlit eftir fyrisitingarlógini, er tað ikki avgerandi fyri viðgerðina av innlitsumbønini, um myndugleikin metir skjølini, ið eru skrásett í málinum, vera av týdningi fyri málið ella viðkomandi fyri partin. Atlit skal einans takast til, um skjølini ella upplýsingarnar, ið eru skrásett í málinum, kunnu verða undantikin eftir reglunum í §§ 12 – 15 í fyrisitingarlógini

Tá klagarin ikki hevur fingið innlit í øll skjølini, sum eru skrásett í teimum barnaverndarmálum, sum hann er partur í, og hann ikki hevur fingið eina grundaða sýtan um hesi skjøl, fari eg at geva B barnaverndartænastu eina átalu fyri viðgerðina av málinum, og fari at heita á Barnaverndartænastuna um at viðgera málið av nýggjum.

Eg fari í hesum sambandi at mæla til, at B barnaverndartænasta gevur klagaranum somu skjalayvirlit, sum eru send mær við eyðmerking av teimum skjølum, ið innlit er veitt í. Á hendan hátt verður lættari hjá klagaranum at vísa á, hvørji onnur skjøl, ið hann ynskir innlit í.

Verður innlit sýtt í ávís skjøl ella upplýsingar, eigur B barnaverndartænasta at grundgeva fyri sýtanini og geva kæruvegleiðing jbr. § 16 stk. 5 í fyrisitingarlógini og § 65 í barnaverndarlógini.

Burtursæð frá hesum geri eg ikki meir við málið.

Hetta skriv er eisini sent A til kunningar og verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara í navnleysum líki.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður